# Lýsingin seyði alt

**Seinnapartin í gjár var avdúkað, hvør var besta lýsingin í 2005. Fleiri uppskot vóru til henda heiðurin, men vinnandi lýsingin var tann hjá Strandferðsluni**

AD-EVENT 06

*Snorri Brend*




*Lýsingarmenninir Høgni Rasmussen og Tomas Altamirano, og lýsarin, Andras Jensen (vm.) hjá Strandferðsluni fegnast um heiðurin, sum teimum varð vístur seinnapartin í gjár*
*Mynd: Gudny Langgaard*

**Lýsingar:** Nógv hava helst steðgað við hesa lýsingina – bæði føroyingar og ikki minst útlendingar.

Lýsingin hjá Strandferðsluni er av einum stórum bussi sum noyðist at steðga fyri einum veðri á vegnum omanfyri Sandavág.

Teksturin er eisini týðiligur og greiður á enskum máli: "it's sheep and easy by bus".

Millum 23 aðrar lýsingar varð hetta lýsingin, sum var kosin sum ársins besta í 2005.

## Greiður boðskapur

Lýsingin varð gjørd í mai mánaði í fjør av lýsingarfyritøkuni Sansir. Hugskotið til hesa lýsingina høvdu Høgni Rasmussen, Ingi Rasmussen og Tomas Altamirano.

Hesa lýsingina dámdu lesararnir hjá Vinnuvitan so væl, at teir, saman við eini altjóða dómsnevnd mettu hesa sum ársins lýsing í fjør.

Ein i av dómarunum Rannvá Hytten, ið dagliga starvast í donsku lýsingarfyritøkuni Nordpro, segði m.a. soleiðis um vinnandi lýsingina:

– Lýsingin er ansvekjandi við sera flottum samanspæli millum yvirskrift og mynd. Samspælið skapar ein boðskap, ið umvegis skemt beinavegin fangar málbólkin, ið er útlendsk ferðafólk.

– Móttakarin er ikki í iva um hvat lýsingin snýr seg um – nevniliga, at tað er bíligt og lætt at ferðast við bussi í Føroyum.

Tað var Vinnuvitan sum skipaði fyri hesum tiltakinum, sum er ein roynd at vísa á tað fjølbroytnið sum finst innan hesa vinnugreinina her á landi.





## Móttøka

Føroya Sparikassi letur upp nýggja deild í Fuglafirði 20. mars. Í tí sambandi er móttøka á nýggju deildini 17. mars kl. 15.00 til 17.00.

Øll eru vælkomin.

FØROYA SPARIKASSI

VÁSTI 408030

## Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til projekterings- og eftirlitsarbeiði við rørtekniskum innleggingum:

· HVS-innleggingar
· Ventilatiónsskipanir
· Kloakk skipanir
· Vatnveiting
· Fjarhitaskipan
· Sprinklaraskipan
· Maskintekniskar skipanir

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving í verkfrøði ella líknandi og royndir við omanfyri nevndu arbeiðsøkjum.

Tað er umráðandi, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Roknast kann við, at ein partur av arbeiðnum fer fram uttanlands.

Tað er ein treyt, at tú dugir at arbeiða við teldu og forritum sum Word, Excel, MSProject og AutoCad/ABS.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu millum partarnar.

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til Árna Jakobsen tel 353521/233521.

Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 28. mars 2006.

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
**Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.**

J.H. Schrøtersgøta 22, Postmoga 344, FO-110 Tórshavn
**Tel (+298) 353522 Fax (+298) 310622**

TEAM 85